## Kundi doyð í kulda

Ein ungur maður í Karasjok í Norðurnoregi skal helst takka løgregluni fyri, at hann framvegis er á lívi. Um áttatíðina sunnumorgunin kom løgreglan fram á mannin, sum var sovnaður úti. Tað vísti seg, at maðurin hevði verið í býnum kvøldið fyri og hevði fingið so nógv at drekka, at hann vann ikki upp hús. Tað frysti heili 31 stig í Karasjok sunnunáttina, og maðurin var eisini ógvuliga kaldur, tá løgreglan kom fram á hann.

## Spyr um Televarpið

Løgtingsmaðurin Páll á Reynatúgvu vil hava Bjarna Djurholm, landsstýrismann at greiða Løgtinginum frá ymsum viðurskiftum hjá Televarpinum. Tingmaðurin fýlist á, at fólk í Sandoynni og Suðuroy fáa ikki gleði av Televarpinum, men hann vil eisini hava greiði á øðrum viðurskiftum. Eitt nú spyr hann um fíggarliga úrslitið hjá Televarpinum seinastu árini, hvør fíggjar møguligt hall, og um ábyrgdarbýtið er millum Televarpið og Kringvarpið.

# Bjóða Smyril fram sum flótandi listaskála

**Nú bjóðar Strandferðslan føroyskum listafólki at hava framsýningar umborð á Smyrli**

LISTAFRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal okkara størsta og stásiligaa strandfaraskip eisini verða ein sýnisgluggi fyri føroyska list.

Í hesum sambandi ferð Strandferðslan at bjóða listafólki at hava framsýningar umborð á Smyrli.

Tá ið Smyril kom í flotan, legði Strandferðslan stóran dent á, at brúka flaggskipið til at vísa føroyska list fram og tískil bjóðaði hon listafólki til at prýða skipið.

Tey listaverkini kunnu nú síggjast víða hvat umborð á skipinum.

Men nú fer Strandferðslan eitt stig víðari og bjóðar listafólki at hava framsýningar umborð á Smyrli.

Tað verður ein heilur veggur í bakborði á kafeteriadekkinum, sum er settur av at vísa list fram á.

- Tað verður ókeypis hjá listafólki at hava framsýningar umborð á Smyrli og hvør framsýning kann hanga uppi í ein mánað, sigur Heini á Borg á Strandferðsluni.

Hann sigur, at tað skal vera rúm fyri allari list umborð á Smyrli. Tað kunnu sostatt vera bæði málningar, listahandverk, brúkslist, sniðgeving og annað.

Einasta treyt er, at listin kann hongjast upp á veggin. Listafólk kunnu so hefta ein lista við, har tey siga, hvar áhugaðir keyparar kunnu venda sær.

Heini á Borg heldur at Smyril er eitt frálíkt framsýningarhøli, tí har kemur nógv fólk hvønn einasta dag, eisini fremmand ferðafólk. Sostatt er Smyril kanska eitt hin besti sýnisgluggin yvirhøvur til list í landinum.

Tey listafólk, sum hava hug at sýna fram umborð á Smyrli, skulu venda sær til tænastuleiðaran umborð.

Tann fyrsti at hava listaframsýning umborð á Smyrli er Palle Julsgart á Tvøroyri, sum hevur 8-10 oljumálningar av fiski, hvali og landsløgum.

Og tann framsýningin verður at síggja allan februar mánað.



*Palle Julsgart er fyrsta listafólki, sum hevur framsýning umborð á Smyrli. Men nú fáa øll listafólk møguleika at læna Smyril ókeypis at hava framsýningar í*

# Føroyingar nummar fýra

**Danska liðið vann altjóða OILSIM-finaluna í London**

Nú er nú greitt, at føroyska endaði á fjórða plássinum í finalurin í OILSIM kappingini í London í dag.

Tilsamans hava 1000 næmingar verið við í tiltakinum, sum er ein kapping ímillum miðnámsskúlar og í dag vóru bestu næmingarnir úr fimm londum í finaluni.

Í føroysku OILSIM kappingini vann ein bólkur við trimum næmingum á Føroya Handilsskúla í Tórshavn og saman við læraranum, Súsan Klein Gregoriussen eru tey farin til London at vera við í finaluni

Umframt upplivilsi, er høvuðsvinningurin 2000 pund, ella einar 22.000 krónur.

Finalan endaði við donskum sigri, tað var eitt lið úr Esbjerg, sum vann. Grønlendingar vóru nummar tvey, Skoltland var nummar trý, Føroyar nummar fýra og norska liðið endaði aftast.

Tað er føroyska felagið Simprentis, sum skipar fyri tiltakinum, sum Chevron og Maersk hava stuðlað sum eitt lið í teirra royndum at geva ungdómum eina grundleggjandi fatan av oljuvinnuni.

Jens Petur Bærentsen, rakstrarleiðari hjá Simprentis, greiðir frá, at tey hava staðfest, at næmingar og lærarar í øllum londunum hava lært nógv um oljuídnaðin við at vera við í OILSIM. Hann sigur eisini, at næsta heyst verða tiltøkini enn meira umfatandi.

Umframt útbúgvingartiltøk av hesum slagi, skipar Simprentis fyri skeiðum fyri oljufeløg og onnur bæði í Føroyum og um allan heim.



*Guðrið Jacobsen, Durita Johansen og Elisabeth á Gadd Clementsen frá Føroya Handilsskúla umboða Føroyar í OILSIM finaluni í dag*